Føroya Banki

# Áheitan um restskuldartrygging

## Upplýsingar um tryggjaða

Navn: ______________________ P-tal: ____________

Bústaður: ______________________ Ársinntøka*: ____________

Postnummar: ____________ Bygd/býur: ____________

Telefonnummar: ____________ Teldupostur: ____________

*Ársinntøkan skal upplýsast tá søkt verður um óarbeiðsføristrygging

**Eg ynski, í samstarv við Føroya Banka at verða tryggjað/ur við niðanfyristandandi tryggingum hjá Tryggingarfelagnum LÍV, Tryggingin verður stovna til trygd fyri allari skuld hjá undirritaða í P/F Føroya Banka, undir hesum skuld upptikin í DLR umvegis Føroya Banka**

## Upplýsingar um Restskuldartryggingina

**Restskuldartrygging**

☐ Nýggj trygging

☐ Broyting av verandi tryggingarupphædd

**Tryggingarupphædd**

☐ 575.000 kr.

☐ 800.000 kr.

☐ 1.150.000 kr.

☐ 1.700.000 kr.

*Fyri at tekna Ávísar hættisligar sjúkur og/ella Óarbeiðsføri sum ískoyti til Restskuldartryggingina er tað eitt krav, at tekna eina Restskuldartrygging á í minsta lagi 575.000 kr.*

**Ávísar hættisligar sjúkur**

☐ Nýggj trygging

☐ Broyting av verandi tryggingarupphædd

**Tryggingarupphædd**

☐ 230.000 kr. fyri vaksin og 130.000 kr fyri børn

☐ 115.000 kr. fyri vaksin og 69.000 kr. fyri børn

**Óarbeiðdsføri***

**Tryggingarupphædd**

☐ 103.200 kr. fyri árið 2025

* Við at velja óarbeiðsføristrygging vátti eg, at tað er mítt ynski, at óarbeiðsførisveitingin fylgir mótrokningarmarkinum, ið Almannaverkið ásetur á hvørjum árið. Mær er greitt, at veitingin og tryggingargjaldið kann broytast árliga.

## Tryggingargjald

Tryggingargjaldið, sum verður goldið frammanundan mánaðarliga, skal skuldskrivast fylgjandi kontu

Kontunummar: ______________________

## Tilskilan

Útgoldið verður til "næsta avvarðandi" um tú ikki hevur givið okkum boð um annað.

- Næsti avvarðandi er í fyrsta lagi hjúnafelagin
- Er eingin hjúnafelagi, verður útgoldið til børn, íroknað ættleidd børn
- Um eingi børn eru, verður útgoldið sambært arvalógini/testamenti.
- Legg til merkis, at ein møguligur sambúgvi er ikki fevndur av hugtakinum “næsti avvarðandi” í hesum høpi.

Er hetta ikki í tráð við títt ynski, er tað lætt og ómakaleyst at broyta tilskilan. Oyðiblaðið, ið tú skalt útfylla og senda okkum finnur tú á heimasíðu okkara www.bankin.fo/privat/taenastur/pensjon-og-trygging/pensjon/skjol

## Gildiskoma

☐ tann 1. í komandi mánað, treytað av at heilsuváttanin verður góðkend av LÍV.

☐ frá tí degi undirskrivað áheitan er latin Føroya Banka, treytað av at heilsuváttanin verður góðkend av LÍV*

*Goldið verður altíð fyri heilan mánað

## Undirskrift

Eg samtykki við undirskrift mínari at Føroya Banki víðariletur mítt p-tal til LÍV í sambandi við viðgerina av hesari áheitan. Somuleiðis vátti eg við míni undirskrift niðanfyri, at eg havi fingið útflýggjað og lisið Restskuldartryggingarskjali, faktablaðið um restskuldartrygging, umframt "Upptøkutreytir í samband við Restskuldartrygging"

____________ ____________ ______________________

Staður Dato Undirskrift

# Faktablað um restskuldartrygging

Restskuldartryggingin verður teknað sambært galdandi tryggingartreytum hjá LÍV.

Galdandi tryggingartreytir finnast á www.bankin.fo, umframt at tað altíð ber til at biðja um avrit av treytunum við at venda sær til Føroya Banka.

Ert tú millum 18 og 50 ár, hevur tú møguleika at tekna restskuldartrygging hjá LÍV.

## Ásetingar

- Samlaða tryggingarupphædd við deyða kann í mesta lagi vera kr. 3.000.000,00.
- Tryggingarupphæddin við óarbeiðsføri kann í mesta lagi vera 40% av tíni árligu lønarinntøku.
- Ynskir tú at tekna trygging við ávísum hættisligum sjúkum og/ella óarbeiðsføri er tað ein treyt at tú eisini hevur eina trygging við deyða. Hesa kanst tú annaðhvørt tekna samstundis ella hava frammanundan.
- Hevur tú valt, at tryggingargjaldið skal takast av eftirlønargjaldinum, kann samlaði kostnaðurin fyri allar tínar tryggingar í mesta lagi vera 1/3 av móttikna eftirlønargjaldinum.

## Gildiskoma

- Tryggingin tekur við 1. í mánaðinum ella frá tí degið, at Føroya Banki  hevur móttikið áheitanina, treytað av, at heilsuváttan verður góðtikin.

## Skattur

Tryggingargjaldið verður goldið við skattaðum peningini og útgjaldið er skattafrítt. Tó kann arvaavgjald verða álagt útgjald av lívstryggingini.

## Serstøk dátuverndarkunning

Niðanfyri er serstøk kunning um tær viðgerðir, sum Føroya Banki og LÍV fremja í sambandi við, at tú sum kundi velur at tekna restskuldartrygging í LÍV umvegis Føroya Banka.

Føroya Banki og LÍV eru bæði sjálvstøðugir dátuábyrgdarar í mun til tær upplýsingar, sum tey hvør í sínum lagi viðgera. Tískil galda teirra almennu dátuverndarkunningar, sum leinkja er til niðanfyri, afturat hesi serstøku kunning, sum einans er galdandi, tá ið hendan áheitan um samlagstrygging verður nýtt.

*Áheitan*

Í sambandi við, at tú útfyllir hesa áheitan um at tekna trygging, skrásetur Føroya Banki hesar upplýsingarnar í sínum skipanum, soleiðis, at tú kanst síggja tínar tryggingar í netbankanum, umframt at vit kunnu trekkja tryggingargjaldið av tínari konto. Upplýsingarnar verða eisini latnar LÍV, sum síðani skrásetur hesar í sínum skipanum, soleiðis at LÍV kann skráseta teg sum kunda og tekna valdu tryggingarnar.

- Navn
- Bústað
- P-tal
- Telefonnummar
- Teldupost
- Um tørvur er á tí, verða heilsuupplýsingar (viðkvæmar upplýsingar) innheintaðar á serstøkum skjali, sum bert LÍV hevur atgongd til

*Endamál*

Endamálið við viðgerðini av upplýsingunum er at avgreiða/umsita tína áheitan og tínar avtalur um tekning av restskuldartrygging.

*Viðgerðarheimild*
Viðgerðarheimildin hjá bæði Føroya Banka og LÍV ísv. áheitanina og eftirfylgjandi viðgerðina er DVL § 8, stk. 1, nr. 2, tí hon er neyðug fyri at halda eina avtalu, sum tú er partur av, ella fyri at gera tað, sum eftir áheitan frá tær er neyðugt, áðrenn avtalan verður inngingin.

Viðgerðarheimildin hjá LÍV fyri heilsuupplýsingar er DVL § 12, stk. 1, nr. 7, tí viðgerðin er neyðug fyri at eitt møguligt rættarkrav hjá tær, t.d. ísv. krav undir lívstrygging, kann sannast, gerast galdandi ella verjast.

Bæði Føroya Banki og LÍV hava heimild at nýta títt P-tal til eintýdda merking sambært fíggjarlóggávuni. Hendan heimild fevnir tó ikki um víðarigeving, og tískil biðja vit um títt samtykki til víðarigeving, sbrt. DVL § 16, stk. 3, nr. 1.

*Móttakarar*
Føroya Banki letur einans upplýsingar um teg víðari til LÍV.

LÍV letur ikki upplýsingar um teg víðari, men kann, um ein trygging ikki kann teknast, boða Føroya Banka frá hesum. Tó verður orsøkin ikki upplýst.

*Nærri upplýsingar um rættindi v.m.*
Upplýsingar viðvíkjandi striking av dátum og tínum rættindum eru at finna í almennu dátuverndarkunningunum hjá ávikavist Føroya Banka og LÍV, sum eru at finna her:

Føroya Banki: www.bankin.fo/fo/privat/um-okkum/um-bankan/privatlivspolitikkur
LÍV: www.liv.fo/158

Á omanfyri nevndu leinkjum finnur tú eisini upplýsingar um, hvussu tú setur teg í samband við ávikavist Føroya Banka og LÍV, umframt upplýsingar um klagumøguleikar.

## Minst til:

Tá broytingar henda í tíni lívi, er skilagott at kanna um broytingar skulu fremjast í tínum tryggingarviðurskiftum

Føroya Banki

# Upptøkutreytir í samband við Restskuldartryggging

## § 1

1. Sjálvbodna Restskuldartryggingin fevnir um trygging fyri alla skuld til Føroya Banka, íroknað skuld upptikin í DLR Kredit A/S umvegis Føroya Banka. Um samlaða restskuldin er lægri enn tryggingarupphæddin, verður restupphæddin útgoldin til næsta avvarðandi, um ikki annað er avtalað.
2. Tað er ein treyt, at lántakari, ið søkir um Restskuldartrygging, hevur nøktandi heilsustøðu og ikki er fylt/ur 51ár. Heilsulýsing verður send til LÍV til góðkenningar.
3. Um tryggjaði doyr, áðrenn hann/hon fyllir 67 ár, verður tryggingarupphæddin útgoldin sambært § 3, stk. 4 – 6.
4. Tryggingargjaldið verður ásett samsvarandi tøkniliga grundarlagnum hjá LÍV.

## § 2

1. Restskuldartryggingin er virkin, beinanvegin treytirnar í § 1 eru loknar, og undirskrivað umsóknarblað um Restskuldartrygging er latið Føroya Banka.
2. Avtalan um Restskuldartrygging fer úr gildi, tá ið tryggjaði ella Føroya Banki skrivliga sigur tryggingaravtaluna upp, ella 1. í mánaðinum eftir, at tryggjaði nær fólkapensjónsaldur

## § 3

1. Í teimum førum har trygging ikki kann teknast uttan nærri heilsuupplýsingar, fær Føroya Banki beinanvegin boð um hetta. Tá verður umbønin løgd til síðis, til LÍV hevur fingið útflýggjað og góðkent neyðugu heilsuupplýsingarnar.
2. Verður tryggjaða skuldin hækkað, skal nýggj heilsulýsing útfyllast og góðkennast av LÍV.
3. Restskuldartryggingin verður veðsett til Føroya Banka.
4. Hóast ásetingarnar í § 2 í tryggingartreytunum fyri samlagstrygging, skal tryggingarupphæddin, ið verður útgoldin, nýtast til at afturrinda skuld sambært § 1, stk. 1 í hesum upptøkutreytum. Um samlaða restskuldin er hægri enn tryggingarupphæddin, kann Føroya Banki eftir egnum vali áseta, hvør partur av restskuldini verður afturgoldin.
5. Um ikki annað er avtalað, verður møgulig restupphædd útgoldin til næsta avvarðandi.
    - Næsti avvarðandi er í fyrsta lagi hjúnafelagin.
    - Er eingin hjúnafelagi, verður útgoldið til børn,íroknað ættleidd børn.
    - Um eingi børn eru, verður útgoldið sambært arvalógini/testamenti.
    - Legg til merkis, at ein møguligur sambúgvi er ikki fevndur av hugtakinum “næsti avvarðandi” í hesum høpi.
6. Við skrivligari áheitan ber til at broyta § 3, stk. 5, soleiðis at útgjald við deyða verður goldið til onnur enn næsta avvarðandi. Tryggjaði váttar, at hann/hon hvørki munnliga ella skrivliga hevur sagt rættin frá sær at broyta tilskilanina.

## § 4

1. Restskuldartryggingin er teknað sambært galdandi tryggingartreytum hjá LÍV, og eru ivamál, eru hesar tryggingartreytir galdandi. Tó fevnir hendan Restskuldartrygging ikki um rætt til gjaldsundantøku við óarbeiðsføri.